# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tillukku NSÍ og tillukku til fótbóltsoynna

Nú sorg og ónøgd í eina tíð hava eyðkent føroyskan fótbólt, her verður hugsað um okkara mongu og stóru tap móti fremmandum tjóðum, so gjørdist seinasta vikuskifti ein gleðistíð fyri føroyskan lið- og fyri ikki at siga oyggjafótbólt.

NSÍ gjørdist fyri fyrstu ferð í síni 50 ára søgu føroyameistari. Besta fótbóltslið í landinum. Hetta er einki minni enn eitt bragd, og hesum kann felagið, sum hevur rundan føðingardag í ár, takka teimum frægu spælarunum, venjarum og áskoðarum fyri. Liðið hevur spælt góðan fótbólt og hevur víst sannan stríðsanda og –vilja.

Men kappingin í ovastu deildini, Formunadeildini, er ikki bert ein sigur fyri NSÍ og Runavíkarøkið. Hon er einki minni enn ein stórsigur fyri alla oynna, um tú vil FÓTBÓLTSOYNNA EYSTUROY.

Hóast eitt umfar er eftir í kappingini er tað longu greitt, at ikki færri enn seks av teimum 10 liðunum í Formuladeildini komandi kappingarár eru úr Eysturoynni. Hetta má sigast at vera ótrúliga flott. Tað vísir bara, hvussu stórur áhugi er fyri fótbólti nettupp í Eysturoynni. At áhugin, viljin og dygdin meira enn nakrantíð áður hava sett Eysturoynna á føroyska fótbóltskortið.

Komandi kappingarár verða eisini B68 og ÍF við í bestu deildini. Frammanundan eru NSÍ, Skála, EB/Streymur og GÍ. Bert ein av fótbóltsbygdunum í allari oynni, er ikki við í bestu deildini komandi ár, og tað er Lorvík.

Sjálvandi er tað stórt spell, at hvørki Suðuroyggin ella Vágsoyggin eru umboðaðar í Formuladeildini næsta kappingarár. Tað mugu hesa so liva við, nú onnur lið hava klárað seg betri. Vónandi fara tey at spíla seg út og seta kós móti bestu deildini aftur.

Vit fara at ynskja NSÍ hjartaliga tillukku við meistaraskapinum, og vit fara at ynskja fótbóltinum í Eysturoynni tillukku við at eiga seks av tíggju liðum í bestu fótbóltsdeildini komandi kappingarár.

**Sosialurin**

## Thierry Henry kemur so ikki aftur til Føroya...

SJÚRÐUR SKAALE



Eurosport sendi um vikuskifti eina sending um EM-undankappingina. Myndirnar av dystinum móti Fraklandi vóru vístar og kommenteraðar.

Tað er tað, tað er. Í ítrótti gongur upp og niður. Men so var ein mynd av Thierry Henry við ein sjónvarpsskíggja. Sjónvarpsstøðin vildi vísa honum, hvussu tað sá út, tá franska landsliðið lendi á Vágum. Tá hann sær tær ræðandi myndirnar av flogfarinum, ið setir seg sum ein veingjaskerdur fuglur, tekur hann hendurnar upp fyri andlitið. “Og so var tað einans fyri ein fótbóltsdyst” sigur hann – skelkaður av, at teir skuldu hava váðað so nógv.

Kanska var ikki vandi á ferð í veruleikanum.

Men at fáa fronsku stjørnurnar og ein hala av tíðindafólki til Føroya kundi verið gott fyri ferðavinnna. Men boðskapurin, sum milliónir av Eurosport-hyggjarum fingu frá sjálvum Thierry Henry um vikuskiftið var, at tað er skít etandi farligt at fara til Føroya!

Stórir tónleikabólkar mugu bíða í dagar. Bill Clinton slapp akkurát niður. Franskir landsliðsleikarar halda seg hava verið í lívsvanda. Og hetta eru bara nøkur heilt sjónlig dømi. Eingin veit, hvussu nógv tað kostar okkum í mistum inntøkum, at flogvallarviðurskiftini eru, sum tey eru.

Vit vita, at hetta er okkum dýrt. Bæði so og so. Tað átti ikki at verið so ringt at samst um, hvør okkara næsta, stóra samferðsluíløga skal vera!

## Nær eitt valdømi?

ZAKARIAS WANG



Tá søgumenn í framtíðini fara at viðgera vallógarbroytingar til føroyska løgtingið, fara teir eisini at taka støðu til, nær Føroyar gjørdust eitt valdømi.

Eftir orðaskiftinum í ár at døma høvdu vit roknað við, at teir fara at siga, at hetta hendi í 2007.

Men er hetta vist?

Nógv bendir á, at teir heldur fara at siga, at henda broytingin fór fram í 1923.

Tá løgtingið varð sett á stovn í 1852, varð ásett, at tingmenn vórðu valdir í sjey valdømum. Tey, ið búðu í hesum valdømum, gjørdu sjálvi av, hvør ið skuldi fara á ting at umboða tey.

Í 1923 varð hetta broytt, og Føroyar gjørdist eitt valdømi. Vit høvdu tá fingið politiskar flokkar, og nú vórðu atkvøðurnar til hesar flokkar lagdar saman í eitt tal fyri alt landið, og fingu flokkarnir umboðan á tingi í tann mun, teir høvdu atkvøður í øllum landinum, í hesum eina valdøminum.

Tey fyrrverandi valdømini gjørdust nú uppstillingardømi. Flokkar stillaðu upp listar í teimum, og tær atkvøður, hesir listar fingu, vórðu lagdar saman fyri alt landið. Í fyrstu syftu fingu flokkarnir nøkur umboð í uppstillingardømunum, men var hetta tal ov lítið, vórðu nakrir tingmenn lagdir afturat, og tí kundi tað koma fyri, at ein tingmaður í einum uppstillingardømi kom á ting ikki av tí at tey fólk, sum kendu hann, høvdu valt hann, men av tí at onnur aðrastaðni í landinum høvdu greitt atkvøðu fyri hesum flokki.

Í hesi skipan var ein leivd av tí demokratiska lyndi, sum var í upprunaligu løgtingsvallógini frá 1852.

Nú í 2007 hendir tað, at sjálvt hesin demokratiski snøkil verður burturbeindur. Nú skulu vit ikki longur hava 7 uppstillingardømi, men bert eitt.

Tað er gott klárað at selja hetta undir heitinum av demokratiskum framstigi. Tá verður avgjørt siglt undir følskum flaggi.

## Berghol og onnur hol

EYÐUN MOHR VIDERØ



Magni Laksafoss hevur í løtuni sum sína fremstu politisku uppgávu at útseta ella helst steðga gerð av undirsjóartunnli til Sandoynna. Hetta kostar ov nógv í mun til hansara rokniførleika!

Hann er so "stórur" politikari, at hann ikki kennir tað sum sína uppgávu at hugsa um sovorðin smá øki, ella atkvøðurnar hjá flokki hansara í oynni.

Í høvuðsgrundgevingum sínum vísir hann á sín førleika sum búskaparfrøðingur, men ikki sum politikkari.

Hetta við muninum á frøðingi og politikara kann best lýsast við tankanum, at um tað ikki "loysir" seg, so skulu ongir pengar ofrast! Mangt hevði sæð øðrvísi út í landinum, um hansara politikkur ráddi og trivnaðurin hevði verið nógv verri á øllum økjum, men tíbetur er hann føddur so seint í tíðini!

Eg komi at hugsa um tíð mína á skúlabonki fyri fleiri árum síðan. Hevði ein lærara, ið nevndist Sofus Joensen. Hann undirvísti okkum í donskum. Hann var helst ein hugsari, men eg var ov ungur at skilja hann.

Tá vit ein dagin vóru liðug at gjøgnumganga og rætta danskan stíl, og tíð var eftir, spurdi hann okkum: "Tá ein maður kann grava eitt hol í 10 dagar, hvussu langa tíð nita so 10 menn um sama arbeiði?" Vit vóru ikki í iva: "Ein dag!" Men tá spyr hann okkum við sínum fjálga smíli: "Men um nú holið er so trongt, at allir 10 ikki sleppa framat, hvussu leingi tekur tað so?" Har sótu vit við ongum svari!

Tí vil eg mæla til, at Magni einsamallur gervur sítt politiska hol, tí tá tekur tað neyvt 10 dagar, men lat okkum onnur grava og borða ein tunnil undir Skopunarfirði!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.